**FØROYA KÆRUSTOVNUR**

Fylgiskjal 6

Tórshavn: 25. mai 2018
J.Nr.: 18/00088
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: ah/-

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Hoyringsviðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni**

Víst verður til skriv tykkara frá 6. apríl 2018, har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar. Í hesum sambandi skal vart gerast við, at okkara viðmerkingar bert snúgva seg um kæruviðgerðina.

Eftir § 56 í uppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um kæru og at avgerðir eftir lógini og reglum ásettum við heimild í lógini bara skulu kunna kærast til ávísa kærunevnd.

Sagt verður at verandi uppskot kemur í staðin fyri partar av verandi náttúrufriðingarlóg, men fevnir nógv víðari enn so og í stóran mun brýtur upp úr nýggjum.

Onki sæst tó í uppskotinum um, hvørjar avgerðir skulu kunna kærast til hesa møguligu kærunevnd, hvør skal kunna kæra tær og hvussu nógvar og umfatandi kærurnar væntandi fara at vera. Um talan er um skundmál ella okkurt annað serstakt. Heldur onki er nevnt um, hvør skal manna slíka nevnd, um ætlanin er, at Kærustovnurin skal hava um hendi skrivstovuvirksemi hjá nevndini ella um kostnaðin av slíkari nevnd.

Tað er tó greitt, at talan er um eitt umfatandi lógarverk, eisini um sæð verður burtur frá teimum nógvu heimildunum í uppskotinum at seta í verk kunngerðir. Roknast má við, at talan verður um mál, sum kunnu verða trupul løgfrøðiliga og at tey í ávísum førum skulu viðgerast í skundi. Mál um steðgandi virknað verða ivaleyst eisini ein partur av nevndararbeiðinum og onki er at ivast í, at náttúran hevur størri áhuga millum fólk enn nakrantíð. Áhugabólkar av ymsum slagi engagera seg í slík mál og tí kann væntast, at tað bara verða fleiri mál framyvir enn higartil.

Út frá hesum verður mett, at skal Kærustovnurin hava um hendi skrivstovuvirksemi hjá hesi kærunevnd, fer hetta at innibera eina eyka arbeiðsbyrðu fyri stovnin. Allarhelst fer uppgávan at krevja ein løgfrøðing og hálvt skrivstovufólk afturat, um øki skal kunna fyrisitast á nøktandi hátt og kærur á hesum øki ikki skulu lastað verandi arbeiði á stovninum.

UNDIR HORNABAKKA • POSTSMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • TELDUPOSTUR: FKS@FKS.FO

Mælt verður tí til, at kostnaðurin av at seta á stovn eina kærunevnd verður tikið við í lógaruppskotinum.

Vinarliga

Føroya Kærustovnur

Anja Hovgaard, stjóri

SIGMUNDARGOTA 13, 2. HÆDD • POSTMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • TELEFAX 32 05 90